

*Nógv áhugaverd skjøl og myndir er at síggja í Smiðjuni, har býarmenningin í Havn verður lýst í árunum 1955 til 2005*

*Mynd: Bárður*

# Gomul skjøl fram í ljósið

**Ólavsøka:** Ein av áhugaverdu framsýningunum á ólavsøku er hon, sum mánadagin lat upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Hetta er framsýning har til ber at síggja, hvussu Havnin er vaksin í fólkatali og vavi hesi seinastu fimmti árini.

Framsýningin gevur ikki bert eitt søguligt baksýni. Har ber til at síggja ymiskar fram-tíðarætlanir innan byggi- og býarskipan.

Tað er Landsskjalasavnið og Býarsavnið sum í felag standa fyri framsýningini. Hon er at meta sum eitt framhald av framsýningini á søvnunum í fjør, tá býarmenningin í tíðarskeiðnum 1856 til 1954 varð víst fram. Framsýningin er opin fram til sunnudagin.

**sb.**

# Yrkingar frá Sveini

**Nýtt yrkingasavn er komið út og tað er Sveinur Ísheim Tummasson, ið eigur orðini í teimum 28 yrkingunum**




Yrking
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fleim nevninst nýtt yrkingasavn, sum forlagið Stiðin gevur út.

Tað er Sveinur Ísheim Tummasson, ið er yrkjarin. Talan er um 28 yrkingar, harav fimm tættir eru, tvey orðtøk og ein vísa.

Yrkingarnar snúgva seg um tilveru, kærleika, náttúru, samfelag, mál, skaldskap og tjóðskap. Rím og rútma eru føst og málið fornt.

Sveinur byggir sín skaldskap á gamla skaldskaparhevd og sipað verður stundum til annan skaldskap.

Fleim kostar 100 krónur og fæst í bókabúðunum.



*Bilurin fór illa í eldinum á bryggjuni í Kollafirði mánakvøldið*

# Eldur í bili

**Kollafjørð:** Um 22:30-tíðina mánakvøldið kom eldur í ein bil, ið stóð á bryggjuni við bátahylin í Kollafyri

Sum skilst, ætlaði eigarin sær ein stimitúr við báti sínum. Hann fór úr bilinum, men legði tá til merkis at tað byrjaði at loga úr motorrúminum.

Fólk á bryggjuni royndu at sløkja eldin í bilinum við spuluslangu og spannum við vatni, men tamarhald fekst ikki á eldinum, fyrrenn ein maður kom við eldsløkkjara at sløkja við.

Sløkkiliðið úr Havn, partvíst við manning úr Kollafirði, kom á staðið eftir uml. 20 minuttum, men tá var eldurin mest sum sløktur.

Skaðin á bilin var stórur.

# Kaj Klein gevur fløgu út

**Kaj Klein er kendur frá øðrum tónleikaútgávum, men nú er hann aftur við fløgu, har hann letur kend føroysk løg í nýggjan búna**

DAGFINN OLSEN
*dagfinn@sosialurin.fo*

Kaj Klein gevur í hesum døgum út fløguna Hálvt frá Hálsi. Kaj kenna vit frá øðrum tónleikaútgávum, t.d. Plastnoist, sum hann gjørdi saman við bróðuri sínum Karl Anton.

Men nú er Kaj aftur fløgutøkur. Nýggja fløgan hevur 10 føroysk løg á, sum eru góð og kend millum manna, men á fløguni eru tey endurinnspæld í nýggjum búna. Fløgan er innspæld í og rundanum Århus í árunum 1998 til 2005. Kaj hevur lagt tilrættis og Freddy Albrektsen hevur tikið sær av ljóðblandinum.

Umframt føroyskar tónleikarar, eru ungir og evnaríkir danskir tónleikarar at hoyra á fløguni. Fløgan fæst í Keypsamtøkuni í Hoyvík og í Havn og hjá Tutl og verður seinni – umleið hálvan august – at fáa kring alt landið.

Tað er forlagið We don't hava to records, ið gvur út.

